# Havgrímur við nýggjum byggiætlanum



**Havgrímur Johannesen hevur selt bæði Snikkaravirkið í Grønlandi og sín part í Frants Restorff bygninginum, og arbeiðir nú við øðrum ítøkiligum byggiætlanum**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Havgrímur Johannesen hevur fyri kortum selt Snikkaravirkið í Grønlandi til Team 85. Havgrímur Johannesen hevði ætlanir um at byggja íbúðir í gamla bygninginum, men Team 85 kom við einum so mikið góðum boði, at gjørdi av at selja beinanvegin. Eisini nú hann hevði fingið loyvi at fara undir at byggja íbúðir har.

## Selt sín part í Frants

Havgrímur Johannesen var eisini partur av teimum, sum keyptu gamla bakaríið Frants Restorff og miðbýnum í Havn. Her hevur Havgrímur Johannesen eisini gjørt av at selja sín part. Hann greiðir frá, at hann fekk eitt gott tilboð, og sum hann sjálvur tekur til, so er hann bara ein maður, so tað avmarkar seg sjálvt, hvussu nógvastaðni hann far verið samstundis.

Havgrímur Johannesen sigur, at í løtuni arbeiðir við øðrum byggiætlanum. Hann ynskir ikki at koma nærri inn á, hvørjar hesar ætlanir eru, men avdúkar tó, at talan er um eina stóra byggiætlan, sum er ítøkilig og meiri enn bara ein ætlan, umframt onkur smærri projektir.

Sig tína meining í Sosialinum





## LÆRLINGUR

### til gávudeildina í Idé Møblum

Idé møblar sóknast eftir einum evnaríkum og miðvísum lærlingi, ið kundi hugsað sær útbúgving í okkara spennandi møblahúsi.

**Okkurt um teg**
Vit vænta av tær, at tú hevur FHS og hevur hug at arbeiða við spennandi gávulutum, ið seta dám á føroysku heimini. Tú hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin.

**Okkurt um okkum**
Vit bjóða eitt spennandi starv í einum nútímans møblahúsi, ið setir tænastuna í hásæti. Arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku. Uppi í lærutíðini er eisini skúlagongd á Handelsfagskolen í Odder.

**Umsókn**
Send eina stuttorðaða lýsing, merkt lærlingur, til okkara skjótast gjørligt. Vit hava brúk fyri tær at byrja sum skjótast, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

IDEmøblar
Uppi á Hálsi · Tel 35 46 80



inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Sethús og handil – Stoffalág 25, Tórshavn**
Ognin er eitt sethús á 168 fermetrar við tilhoyrandi handilsbygningi á 70 fermetrar - í alt 238 fermetrar. Grundøkið er 689 fermetrar. Byggiár: 1959 / 1970. Í niðaru hædd er inngongd, gongd, kamar, tekøkur, wc, 2 ítrivsrúm, goymslurúm, hjallur, baðirúm, vaskirúm / fýrrum við egnari inngongd, gongd og trappurúm. Haraftruat kemur handilsbygningur. Har er inngongd, durur, handilshøli goymslurúm, tekøkur / matarstova og wc. Í ovaru hædd er vindfang, inngongd, wc, gongd, køkur, borðstova / stova við útgongd til svala / terassu, hjúnarrúm og 2 kømur. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi nær við skúla, barnagarð og busssamband og hava hampuligt útsýni. Handilsbygningurin stendur høgliga fyri við góðum parkeringsmøguleikum. Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.



**Sethús – Sandoyravegur 14, Hvannasund**
Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd um 300 fermetrar. Grundøkið er um 1500 fermetrar. Byggiár: 1982. Í erva er durur, 2 wc, gongd, køkur / alrúm, stór stova, hjúnarrúm, 3 kømur, baðirúm og hjallur. Í neðra er durur, gongd, kamar, goymslurúm við møguleika fyri at gera baðirúm, vaskirúm, fýrrúm, kjallararúm og garagu. Húsini standa norðanfyri byrgingina omanfyri høvuðsvegin. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



**Jørð – stór trøð á Borðhjalla, Oyri**
Ognin er ein stór trøð á Borðhjalla 13.328 fermetrar við ástandandi húsum, ið tørva ábøtur, eitt grundøki á 168 fermetrar og eitt grundstykki í fjøruni á 500 fermetrar við ástandandi stórari neystagrund. Ognin liggur sera væl fyri omanfyri bygdina, og vegur er til trøðna. Trøðin er sera væl egnað til bygging av einumhvørjum slag - eisini til ferðavinnu- og heilsubótandi (rekreativ) endamál. Ognin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi og hevur sera gott útsýni runt sjónarringin (panorama). Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.



**Sethús – Rituvíksvegur 9, Rituvík**
Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml 236 fermetrar. Grundøkið er 776 fermetrar. Byggiár: 1987. Í erva er durur, gongd, køkur, stór stova, baðirúm, 3 kømur. Í neðra er durur, gongd, 3 kømur, klædnarúm, fýrrúm, kjallararúm / vaskirúm og hjallur. Húsini standa væl fyri við góðum útsýni út yvir víkina. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01
inni